# BP nærkast enda á boring

OLJULEITING
*Jan Müller*

**Um lítla viku verður BP liðug at bora sína fyrstu royndarboring. Og so skjótt sum úrslitið er greitt fer oljumálastýrið at boða Føroya Fólki frá, um BP hevur funnið olju skrivar Vinnuhúsið á síni heimasíðu mánadagin**



Heimasíðan hjá Vinnuhúsinum hevur prátað við Hjarnar Djurhuus, stjóri hjá BP í Føroyum, og hann sigur, at royndarboringin eftir ætlan.

BP skal bora 4.840 metrar niður harav 1.070 metrar eru frá havyivirflatuni niður á botn. Hjarnar Djurhuus kann ikki siga nakað frá boringini hvat hon vísur og um olja er funnin. Allar royndarboringarnar í summar eru hvat man kallar a tight hole – og tað vil siga at tað er bara oljumálastýrið, sum kann boða frá um royndarboringarnar. Hjarnar Djurhuus upplýsir tó, at um lítla viku eru teir lidnir at bora. Frá oljumálastýrinum verður sagt at so skjótt úrslitið av eini royndarboring er tókt, verður tað almannakunngjørt. Tað verður ikki bíðað til allar royndarboringarnar eru lindar.

Føroysku fyritøkurnar, sum hava verið við í hesum fyrsta skeiði av eini møguligari oljuvinnu, hava klárað seg væl verður gjørt greitt á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum. »Vit eru vælnøgdir við føroysku fyritøkurnar« sigur Hjarnar Djurhuus. »Geva føroysku fyritøkurnar eina góða tænastu er tað tað besta atgongumerkið til at sleppa at halda á fram.«

At føroysku fyritøkurnar, sum longu er slopnar upp í part gera eitt gott arbeiði, skuldi eisini gjørt at oljufeløgini tora at brúka aðrar føroyskar fyritøkur, sigur Hjarnar Djurhuus við heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Upp í hvassan vind av suðri og útsynningi, sum minkar út á dagin. Sólglottar men eisini ælaveður. Hitin millum 10 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin og fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi, í skiftum upp í hvassan vind. Skýggjað og møguliga okkurt ælið. Hitin millum 10 og 15 stig.




**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, sum hækkar upp í útnyrðing. Framvegis skýggjað við ælaveðri. Hitin fellur til umleið 10 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 20 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 16 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 17 |
| Keypmannah. | 24 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 22 |
| Berlin | 26 |
| Warzawa | 29 |
| Kiev | 29 |
| Bukarest | 31 |
| Paris | 20 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 31 |
| Malta | 31 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 34 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 21 |
| Sydney | 15 |
| New York | 28 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | – |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 32 |
| La Paz | 4 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Frá einum djúpum lágtrýstið í ein útsynning úr Íslandi reka brúgvaløg inn yvir Føroyar við óstøðugari luft og ælaveðri.



Fyrst í næstu viku hvørvur lágtrýstið í ein landnyrðing og kaldari luft nærkast av útnyrðingi.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 20/08 kl. 06[00]– 21/08 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 12,0°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 4,0 mm – mált frá 20/08 kl. 06[00]– 21/08 kl. 06[00]
Avfallið higartil í aug.: 99,0 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

19. august: Tendring/Mánin næstur jørðini
25. august: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | Suðuroyar-/Vágafirði sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | Hestfirði/Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. aug | 10.09 | 22.33 | 09.09 | 21.33 | 09.24 | 21.48 | — | 12.09 | 00.45 | 13.09 | 08.24 | 20.48 | 07.24 | 19.48 | 10.24 | 22.48 | 11.24 | 23.48 | 09.54 | 22.18 | 11.09 | 23.33 |
| 23. aug | 10.57 | 23.21 | 09.57 | 22.21 | 10.12 | 22.36 | 00.33 | 12.57 | 01.33 | 13.57 | 09.12 | 21.36 | 08.12 | 20.36 | 11.12 | 23.36 | — | 12.12 | 10.42 | 23.06 | 11.57 | — |
| 24. aug | 11.44 | — | 10.44 | 23.07 | 10.59 | 23.22 | 01.21 | 13.44 | 02.21 | 14.55 | 09.59 | 22.22 | 08.59 | 21.22 | 11.59 | — | 00.36 | 12.59 | 11.29 | 23.52 | 00.21 | 12.44 |
| 25. aug | 00.07 | 12.45 | 11.45 | — | — | 12.00 | 02.07 | 14.45 | 03.07 | 15.45 | 11.00 | 23.39 | 10.00 | 22.39 | 00.22 | 13.00 | 01.22 | 14.00 | — | 12.30 | 01.07 | 13.45 |

# Veba og grindadráp á landsstýrisborð

OLJA OG GRIND
*Jan Müller*

Málið um Veba Oil & Gas og tess bræv til felagsskapin Sea Shepherd um grindadráp skuldi koma fyri í landsstýrinum í gjár. Tað er landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, sum umsitur grindahval og grindadráp, Jørgen Niclasen, sum hevur biðið um at fáa málið fyri á landsstýrisfund. Jørgen Niclasen segði við útvarpið mánakvøldið, at tað kann ikki góðtakast, at eitt oljufelag, sum fær sømdir at leita eftir olju í Føroyum, roynir at máa grundarlagið undan grindadrápi. Hann segði seg hava tosað við landsstýrismannin í oljumálum Eyðun Elttør og hevði boðað honum frá, at hann fór at taka málið upp týsdagin.

– Mannagongdin hjá Veba er greitt undirgravingarvirksemi segði landsstýrismaðurin við útvarpið og vísti á, at nú vit hava givið Paul Watson durafjórðingin ber ikki til, at vit kína vinmannin hjá honum við hárinum sigur Jørgen Niclasen.

Tað var annars blaðið Fregnir, sum fríggjadagin bar tíðindini um brævið frá Veba til Sea Shepherd, har tað segði seg vilja gera sítt til at ávirka føroyingar í spurninginum um grindadráp. Í samrøðu við blaðið vístu tveir aðrir landsstýrismenn, Eyðun Elttør og Oli Holm á, at tað kundi ikki góðtakast, at eitt oljufelag, sum hevði fingið leitiloyvi her, leggur seg út í spurningin um grindadráp. Tað er at leggja seg út í føroyska mentan, og tað hava útlendsk oljufeløg einki við at gera. Eisini umboð fyri Grindamannafelagið átalaði í blaðnum framferðina hjá oljufelagnum.

Sosialurin hevur biðið løgmann um eina viðmerking í málinum, men hann sigur seg fyribils einki hava at siga.